# TILTØK

**Gudstænastur**
**2. s. e. trettanda**
***Vesturkirkjan:*** kl. 11.00, Heri Joensen, altarg.
***Havnar kirkja:*** kl. 11.00, Sonja Klein
***Nólsoy:*** kl. 12.00, Bjarni Bæk, altarg., skriftamál kl. 11.40
***Miðvágur:*** kl. 12.00, David Johannesen
***Sørvágur:*** kl. 12.00, altarg., Inga Poulsen Dam
***Norðskála kirkja:*** kl. 11.00, Bergur D. Joensen, altarg.
***Elduvík:*** kl. 12.00, altarg., Uni Næs
***Fríðrikskirkjan:*** kl. 11.00, altarg., Martin R. Jacobsen
***Sjóvar kirkja:*** kl. 11.00, altarg., Jógvan Fríðriksson
***Funningur:*** kl. 12.00, Messa (Josefina Højsted 100 ár), Emil Olsen
***Tjørnuvík:*** kl. 12.00, Marjun Bæk
***Vestmanna:*** kl. 12.00, altarg., Mogens Tilsted Christensen
***Tvøroyri:*** kl. 11.00,
***Hvalba:*** kl. 12.30, altarg., Jónsvein Bech
***Porkeri:*** kl. 12.00, altarg., Patrick de Neergaard

**Fríkirkjan Oasan**
**Kirkjustræti 4**
Mikudagin kl. 18.00 venur Saltið.
Hóskvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti v/ Jóhan P. Johannesen.
Fríggjadagin kl. 20.00 After Eight.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúlin, kl. 18.00 Sangmøti.
Mánadagin kl. 17.15-18.00 venur Barnakórið, kl. 20.00 Bønarmøti. Verið hjartaliga vælkomin. www.oasan.fo

**Adventkirkjan**
Mikukvøldið kl. 19.30 Møti v/ J. V. Danielsen. Evni: Gamlir siðir - nútíðar fatan.

**Lívdin**
**í Hoyvíkar skúla**
Sunnumorgunin nkl. 10.30 Familjumøti har Rúni Højgaard talar um evnið »Strongd: Arbeiði, familjan og samkoman.« Kl. 11.30 Steðgur við drekka.
Kl. 12.00 Tilbiðjanarmøti, Jógvan Z. talar um evni: Sannleikar úr Rómbrævinum kap. 5.1-11 »Frið við Gud«. Barnaansing er undir møtinum. Sunnudagsskúlin kl. 12.00. Møtini kunnu hoyrast á netinum www.livdin.fo

**Missiónshúsið**
**v/ Landavegin**
Hóskvøldið kl. 20.00 Møti.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Týsdagin kl. 6.00 Morgunbøn, kl. 17.00 Tímabøn.
Mikudagin kl. 6.00 Morgunbøn, kl. 17.00 Tímabøn, kl. 19.00 Delli.
Hósdagin kl. 6.00 Morgunbøn, kl. 19.00 Chill.
Fríggjadagin kl. 6.00 Morgunbøn, kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 17.00 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11.00 Morgungudstænasta v/ Rúna Rasmussen, kl. 11.50 Barnagudstænasta. www.filadelfia.fo

**Evangeliihúsið,**
**Tróndargøta**
Sunnudagin kl. 11.00 Familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, kl. 18.00 Evangel. møti við Ester og Hallur Mohr. www.gospel.fo

**Hebron, Argir**
Mikukvøldið kl. 20.00 Bønar- og uppbyggingarmøti, Páll Poulsen talar. Evni: Dópur.
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing, kl. 11.30 Samvera við drekka, kl. 12.00 Sunnudagsskúli, kl. 12.00 Møti, Páll Poulsen talar um evni úr 2. Mós. www.hebron.fo

**Meinigheitshúsið**
Heimsbønarvika er hesa vikuna:
Týskvøldið kl. 20.00 Heimsbønarløta.
Mikukvøldið kl. 19.00 Meinigheitskórið venur. Kl. 20.00 Heimsbønarløta.
Hóskvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti. Kl. 20.00 Heimsbønarløta.
Fríggjakvøldið kl. 20.00 Heimsbønarløta.
Leygarkvøldið kl. 20.00 Heimsbønarløta.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti v/ Aksel Jacobsen, heimsbønarvikan endar.

**Ebenezer**
Týsdagin kl. 17.00 Frítíðararbeiði, kl. 19.00 Sangvenjing - Ungdómskórið, kl. 20.00 Sangvenjing - Ebenezerkórið.
Mikudagin kl. 16.45 Sangvenjing - Yngra barnakórið, kl. 17.00 Sangvenjing - Eldra barnakórið, kl. 20.00 Bønar- og uppbyggingarmøti..
Hósdagin kl. 20.00 Ungdómsmøti, talari: Dánial Petersen.
Sunnudag kl. 10.00 Breyðbróting, kl. 12.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. møti. Fólk úr Klaksvík luttaka. www.ebenezer.fo

**Frelsunarherurin,**
**Tórshavn**
Týsdagin kl. 20.00 Hornvenjing.
Mikudagin Bønar-stafettin er í Havn kl. 7.00-10.00.
Hósdagin kl. 17.30 Junior-Hornvejing. Heimaforbundið verður kl. 20.00 - fyri allar kvinnur.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00 Møti, kl. 18.00 Evangel. møti. Øll eru vælkomin.

**KFUM og KFUK í Havn**
Týsdagin kl. 17.00 í KFUK: Várgleði fyri børn.
Týsdagin kl. 20.00 í KFUK: DaSnakk. Fyri ung.
Týsdagin kl. 19.30 í KFUM: Kristiliga Sangkórið venur. Nýggir sangarar eru vælkomnir við.

**Nazaret, Kaldbak**
Møtirøð við Óla Steinberg úr Klaksvík verður í døgunum frá 13.-15. januar. Møtini fríggja- og leygarkvøldið vera kl. 20.00. Sunnukvøldið kl. 18.00. Ymisk sangluttøka. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Saron, Vestmanna**
Týskvøldið kl. 20.00 Bønarmøti hjá Jòhan Hendrik Hansen.
Sunnudagin kl. 18.00 Evangel. møti.

**Vestmanna Missiónshús**
Missiónsvikan byrjar týsdagin 10. januar við møti kl. 20.00 v/ Hans Kristian Justesen, ungdómsráðgeva og Bjartur Johannesen syngur.
Mikudagin kl. 20.000 Møti við Torleif Johannesen, sjómanstrúboðara og Petur Hans Hansen og Tummas Dam syngja. 1/2 tíma undan hvørjum møti er bønarhald.

**Filadelfia, Miðvágur**
Mikukvøldið kl. 20.00 Undirvísing og bøn.
Hósdagin kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11.00 Familju- og Morgunmøti við Sunnudagsskúla, Dánial á Dul Jacobsen talar.

**Miðvágs missiónshús**
Kvinnumøti verður mikukvøldið kl. 19.30. Allar kvinnur eru vælkomnar.
Leygarkvøldið kl. 20.00 Sangkafé í Bygdarhúsinum við luttøku av Heina Lützen og Ungdómskórinum.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúlii og møti kl. 18.00 v/ Pól Johannesen, trúboðara. Ungdómskórið syngur. Innsavnan til húsið. Nátturði aftaná. Hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið Libanon, Sørvágur**
Sjómanskvinnuringurin kemur saman hóskvøldið kl. 20.00. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Kollafjarðar missiónshús**
Týskvøldið kl. 20.00 Bibliutími.

**Hvalvíkar Missiónshús**
Mikukvøldið kl. 20.00 Bibliutími, Matt. 7. kap. Øll eru vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21.00 Awake við Jákup W. Berg.
Sunnudagin kl. 17.00 Møti við Jan Jaocbsen. Kl. 17.00 Barnamøti.

**Missiónshúsið á Viðareiði**
Møti verður sunnukvøldið kl. 18.00 v/ Hjørleif Poulsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Getsemane, á Brekku 19, Klaksvík**
Mikudagin kl. 20.00 Bønarmøti.
Fríggjadagin kl. 20.30 Ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 10.00 Morgunbøn, kl. 21.00 Ungdóms Róp.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti. Hvønn gerandisdag kl. 6.15 Morgunbøn.

**KFUM og KFUK, Klaksvík**
Týsdagin kl. 21.30 Bønarløta.
Mikudagin kl. 6.15 Bønarløta, kl. 20.00 Bibiltími v/ Hanus Simonsen, evni: »Filemon«.
Hósdagin kl. 19.00 Bønarløta.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18.00 Møti við Hanus Simonsen, kl. 21.00 Ungdómsmøti við Hanus Simonsen. Øll eru vælkomin. www.kuff.fo

**Soli Deo Gloria**
Hóskvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti v/ Margar Toftegaard.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.

**Aglow, Klaksvík**
Møti verður á Soli Deo Gloria leygarkvøldið kl. 20.00, allar kvinnur eru vælkomnar.

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikukvøldið kl. 20.00 Bibliutími, 2. Kor. 12. kap.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Týsdagin kl. 18.00 Juniorklubbur byrjar aftur.
Onsdagur kl. 18.00 Juniormøti, kl. 20.00 Heimaforbundið byrjar aftur.
Hósdagin kl. 17.00 Barna- og ungdómskórið byrjar aftur.
Sunnudagin kl. 18.00 Evangel. møti við barnaansing, Toril og Niels Edvard Olsen talar. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið í Vági**
Alheims bønarvika verður í Missiónshúsinum hvørt kvøld til og við leygarkvøldið kl. 20.00, har øll eru hjartaliga vælkomin.

**Føroysk møtir í Suðurjútlandi - Samkoman Malta**
Fríggjakvøldið 13. jan. kl. 19.30 er føroyskt møti í Sædding senter í Esbjerg.
Leygarkvøldið kl. 19.00 Møti í Skolehjemmet, Sønder Landevej 28, Sønderborg.
Sunnudagin kl. 17.00 føroyskt evangel. møti í hølunum hjá Frelsunarherinum í Staldgårdsgade 4, Vejle. Drekka aftaná hvørt møti. Elsa og Poul Johan Djurhuus frá Malta luttaka.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Teldupostur: tilhald@torshavn.fo
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
***Mánadagin 9. januar***
kl. 10-10.30 Fimleikur
kl. 11-11.45 Enskt á byrjunarstigi 1, Hilda Frýdal
kl. 14-17 Kortspæl, telving, landastrok, kánus o.o. spøl. Høvi er at koma sum gestur til døgurðan miku.- og fríggjadag. Tilm. mánadag á tlf. 316491.
***Týsdagin 10. januar***
kl. 10-11.30 Sangur, Benny og Flemming Samuelsen. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15 Mjólkabáturin RUTH. Àlvur Danielsen
***Mikudagin 11. januar***
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði. Høvi er at koma sum gestur. Tilm. til døgurðan á tlf. 316491
kl. 10-17 Hondarbeiðið. Dominobinding og annað spennandi.
kl. 15.00 **Møguleiki er at fáa eitt skóleistaprát og síggja 70 pør av skóleistum í senn**
***Hósdagin 12. januar***
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 11-11.45 Enskt á byrjunarstigi 2, Àsmundur V. Johannesen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
kl. 14-16 Boccia, Alma Poulsen
***Fríggjadagin 13. januar***
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði
kl. 10-12 Máling og tekning (havi tilfar við). Vegleiðing er á staðnum
kl. 15-17 Opið hús
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Eldrafelagið Nón**
Í vetur koma vit saman til handaligt arbeiði hvønn týsdag frá kl. 15.00 til 18.00.

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
er opið mánadag og mikudag frá kl 13 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Eisini eru bløðuni til taks.
***Mánadagin 9. januar***
Upplestur
***Mikudagin 11. januar***
Boccia í kjallaranum

**Dagtilhaldið í Luffustovu, Fuglafjørður**
*Opið er týs-, miku- og hósdag frá kl. 15.00-18.00*
***Týsdag***
Kort og ymisk spøl
***Mikudag***
Ymisk ítriv
***Hósdag***
Fimleikur
*Hvønn dag drekka við nýbakaðum.*

**Dagtilhaldið Fløvi**
*Í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum.Tlf. 448279.*
Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir. Opið er mánadag til fríggjadag kl. 15-18.
***Mánadagin 9. januar***
Fimleikur
***Týsdagin 10. januar***
Prát og sangur
***Mikudagin 11. januar***
Boccia
***Hósdagin 12. januar***
Myndaskering v/ Hjalmar Olsen og myndaveving við Gretu Olsen
***Fríggjadagin 13. januar***
Byrjandi enskt v/ Anette Gaardlykke

*Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl og bøkur. Tú ert vælkomin at hava títt egna hondarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Tilhaldið á Toftum**
*tlf. 448690*
*er opið frá mánadag-fríggjadag, kl 14.00-18.00.*
***Mánadagin 9. januar***
Myndaútskering og veving frá kl. 16-17. Annars opið hús
***Týsdagin 10. januar***
Telduprát. Bólkarnir møta sum avtala. Nýggj eru vælkomin eisini. Tilhaldið er opið sum vanligt.
***Mikudagin 11. januar***
Vit syngja frá kl. 15-17
***Hósdagin 12. januar***
ættarprát frá kl. 15-17 við luttøku úr Fornminnisfelagnum á Toftum og starvsfólkið úr Próstagarðinum á Nesið
***Fríggjadagin 13. januar***
Boccia frá kl. 15-16.

*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks. Øll eru hjartaliga vælkomin í Tilhaldið á Toftum.*

**Vága Pensionistafelag**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, formannin: Frits Jacobsen, tlf. 332053 ella ein av nevndarlimunum.

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *líkaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

# V4

**Dráttur nr. 1619, tann 7-1-2000**

2 - 17 - 24 - 28 - 33 - 45 - 48 - 62 - 63 - 65 - 73 - 78 - 79 - 89 - 91 - 94

**Vinnararnir eru:**
Snars. nr. 3017897 (Statoilst. í Gundadali)
Snars. nr. 3202179, (Farseðil)
Snars. nr. 3202431 (Farseðil)

**Eykavinningar - Tríggir ferðaseðlar millum Vágar og Kbh. frá Atlantic Airways:**
Snars. nr. 3112804 (Hjá Gunnleivi, Tórshavn)
Snars. nr. 3201957 (Farse›il)
Snars. nr 3202156 (Farse›il)

**Prógv**
2. januar 2006 tók Bjørg Hentze, Tórshavn prógv sum professions bachelor í kosti og heilsu (human ernæring) á Suhrs Seminarium í Keypmannahavn.

**Brúdleyp**
Leygardagin 28. januar kl. 16.00 giftast í Kollafjarðar kirkju Sólrun Mortensen, Argir og Jan Arabo, Kollafjørður. Vælkomst verður í Bygdarhúsinum í Hósvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá innan 15. januar á tlf. 314773, 421180, 229101, 777012, ella mail: somo@post.olivant.fo ella arabo@post.olivant.fo

Leygardagin 4. februar kl. 13.00 giftast í Sjóvar kirkju, Nicolina í Lág, Strendur og Àlvur Jøkladal, Fuglafjørður. Veitslan verður hildin í samkomuni Siloa í Fuglafirði kl. 17.00 fyri innbodnum. Vælkomst er frá kl. 21.00, har øll eru hjartaliga vælkomin.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 24. januar hava Bergur og Mary-Jana á Reynatrøð, Runavík silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík leygardagin 28. januar kl. 18.00. Tey, ið vilja gleðast saman við okkum, vera vinarliga biðin um at siga frá í seinasta lagi 15. januar á tlf. 448128, helst eftir kl. 18.00